Mikkel úr Boogie:

# Gestir gjørdu øllum eftir vild

**Gestir høvdu uppiborið at vunnið. Teir megnaðu at gera øllum eftir vil, bæði áhoyrarunum í salinum og sjónvarpshyggjarunum, meðan aðrir bólkar gingu ov høgt uppí at gera sínum vinum niðri í salinum eftir vild. Tað heldur Boogie studieverturin Mikkel Herforth, sum hevur verið í Føroyum í eina viku í sambandi við Prix finaluna**

PRIX FØROYAR
*Rúnar Reistrup*

Vinnarin av Prix Føroyum, Gestir, fer beinleiðis víðari til kappingina Starfighters á Skanderborg festivalinum í august í ár, har hann kemur at kappast ímóti donskum bólkum um høvuðsvinningin, sum í hesi kappingini er ein plátusáttmáli.

Í tí sambandi valdi ungdómssendingin Boogie hjá DR1, ið saman við Danmarks Radio útvarpsstøðini P3 skipar fyri Starfighters kappingini, at senda ein av sínum studievertum til Føroya saman við einum sjónvarpsliði.

At tað bleiv Mikkel og ikki ein av hinum trimum vertunum komst ikki av at hann úttrykkiliga bað um at verða sendur til Føroya, men tí tað snøgt sagt lá verri fyri hjá hinum enn hjá honum.

### Tónleikurin ov harður

Vit hittu hann til arbeiðis í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið, beint eftir at kvøldsins klimaks var farið framvið.

Sigur tónleikurin í Prix finaluni tykkara hyggjarum nakað?

- Ja partvís, onkrir av bókunum líkjast teimum, sum vanliga eru at síggja í Boogie, men her eru eisini nakrir, sum man als ikki sær. Eg haldi sjálvur, at tónleikurin til Prix finaluna sum heild helst er eitt sindur ov harður og rockutur, til at tey fimtan til fimmogtjúgu ára gomlu í Danmark eta hann ráðan.

### Mugu syngja á enskum

Hvussu fer tónleikurin hjá Prix vinnarunum, Gestir, at rigga sum Boogie innihald?

- Tað fer í hvussu er at skilja seg burturúr mongdini, av tí at teir syngja á føroyskum. Men teir spæla væl. Eg haldi at nakrir av hinum bólkunum gingu ov høgt uppí at gera sínum vinum niðri í salinum eftir vild. Vinnararnir kláraðu at gera øllum eftir vild, bæði áhoyrarunum í salinum og sjónvarpshyggjarunum. So eg haldi, at tað var uppiborið, at Gestir vunnu.



*Í Danmark kann tað vera ein fyrimunur fyri Gestir, at teir syngja á føroyskum, men skulu teir longur enn Danmark, mugu teir nokk byrja at syngja á enskum, heldur Mikkel Herforth úr DR1 ungdómssendingini Boogie*

### Plátusáttmáli er gularót

Starfighters kappingin, sum Gestir hava tryggjað sær luttøku í við at vinna Prix Føroyar, verður ein kapping millum tólv bólkar. Boogie og útvarpsstøðin P3 hava bjóðað bólkum um alt Danmark at senda eina demofløgu inn og soleiðis vera við í úttøkuni til Starfighters kappingina.

Føroyskir bólkar kunnu eisini luttaka, men nú skal berast skjótt at, tí freistin at senda demofløgu inn er 1. mai. Einasta treyt fyri luttøku er, at bólkarnir ikki hava givið fløgu út.

Undan kappingini skulu allir bólkar skriva undir ein bindandi sáttmála við pláturfelagið Starfighter Records. Sáttmálin bindur vinnandi bólkin til at útgeva fyrstu fløgu sína ígjøgnum Starfighter Records.

### Mugu syngja á enskum

Um Gestir klára seg væl og vinna kappingina, kann tað lata nógvar hurðar upp, eisini uttan fyri Danmark.

Spurdur um hann heldur at Gestir hava møguleika at klára seg uttanlands, er Mikkel Herforth er rættiliga varin.

- Tað er ringt at siga. Tað fer nokk at valdast um málið, vætni eg. Á Skanderborg festivalinum verður føroyska málið kanska ein fyrimunur. Við at syngja á føroyskum hava Gestir eitt sereyðkenni, sum fær teir at taka seg burturúr rúgvuni av bólkum. Men skulu teir longur út í heimin enn Danmark, mugu teir nokk byrja at syngja á enskum, heldur Mikkel, sum umframt at røkja sítt arbeiði eisini hevur havt tíð at verið úti og hugt at náttarlívinum í Havnini. Eitt náttarlív, sum ikki hevur nakað ímóti at hava upplivað, men sum hann leygarkvøldið viðgekk, at hann ikki fer at sakna stórliga

Gleðir tú teg at fara heim í morgin?

Ja, eitt sindur. Tað má eg viðganga.

# Makrel í dós

**Nú er finalubólkurin til Prix Føroyar, Makrel, komin út við fyrstu fløguni, við heldur løgna heitinum »Makrel stinkar«**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*




*Makrel hevur nú givið út eina fløgu við heitinum »Makrel stinkar«*

Í gjár, týsdagin, kom út nýggj fløga við Makrel. Hon hevur heldur sjálvspottandi heitið »Makrel stinkar«.

Makrel vóru við til Prix Føroyar finaluna leygarkvøldið, har teir endaðu á einum triðja plássi. Eisini hava teir áður roynt seg í íslendskari tónleikakapping, har úrslitið var gott, og harumframt var Rasmus Rasmussen kosin besti gittarspælari í kappingini.

Fløgan, sum kostar 159 krónur í handlunum, inniheldur 14 provokerandi og minni provokerandi løg, sum øll eru heimagjørd. Tað er 3´arin, sum gevur fløguna út.

Upptøkurnar eru farnar fram í Íslandi, og er tað Gudmund Kristinn Jónsson, eisini nevndur Kiddi, sum har sat handan knøttarnar.

So nú er møguleikin at fáa eitt smakk av Makrel – ikki í dós, men á fløgu.

# Arbeiðarafeløgini egnan kunningarmiðil

**- Kanska verður tað eitt sindur einsíðug kunning, tí vit tala sjálvandi okkara egnu søk, men tað skal ikki vera nøkur propagandamaskina, sigur Georg F. Hansen næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag um innihaldið á nýggja portalinum hjá føroysku arbeiðarafeløgunum**

MIÐLAR
*Rúnar Reistrup*

Arbeiðsgevarafeløgini hava longu í nógv ár havt sín egna miðil á vevsíðuni industry.fo, sum til tíðir hevur verið nógv siteraður í tíðindabløðunum og loftmiðlunum.

Nú hava øll arbeiðarafeløgini eisini tikið stig til at fáa sín egna miðil við portalinum fakfelog.com, sum fyrstu ferð var at síggja mitt í hesum mánaðinum.

Endamálið er sambært Georg F. Hansen, næstformanni í Føroya Arbeiðarafelag, fyrst og fremst at kunna limirnar um virkið hjá arbeiðarafeløgunum, men feløgini vóna, at eisini onnur, ikki minst stóru fjølmiðlarnir, fara at brúka miðilin at kunna seg um hvat fer fram á arbeiðsmarknaðinum.

### Brúk fyri mótvekt

Hóast næstformaðurin í Føroya Arbeiðarafelag ikki er nógv fyri at kalla stigið eina eftirlíkning av Arbeiðsgevarafeløgunum, so ásannar hann at industry.fo hevur skapað tørv á einari mótvekt.

- Vit sóu við seinastu sáttmálasamráðingar, at tíðindini á industry.fo bert lýstu eina síðu av málinum, og at tað bert var í góðum ljósi. Vit halda tað vera umráðandi, at fólk eisini fáa høvi at hoyra um veruleikan, soleiðis sum vit síggja hann, sigur Georg F. Hansen, sum leggur afturat, at hóast sáttmálasamráðingarnar settu skund á arbeiðið at fáa portalin kláran, er hann ætlaður til annað og meir enn at lýsa sáttmálasamráðingarnar frá arbeiðarafelaganna síðu.

Arbeiðarafeløgini løna einum fólki fyri at skriva tíðindi til portalin. Tíðindi verða ikki beinleiðis kontrollerað av arbeiðarafeløgunum, men fara tó at lýsa mál frá sjónarhorni arbeiðarafelaganna. Talan verður tó ikki um nakra propaganda, sigur Georg F. Hansen.

- Tí so tímir eingin at lesa tað, heldur hann

Sáttmálasamráðingarnar eru so smátt farnar ígongd, men enn hevur eingin av pørtunum úttalað seg alment um knútapunktini í samráðingunum, og í teimum báðum internetbornu miðlunum hjá pørtunum er enn lítið og einki at síggja um samráðingarsemjur ella ósemjur.

